formuladeildin

**Formula-deildin**

| | | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 17 | 12 | - | 2 | - | 3 | 31 | 15 | 16 | 38 |
| 2 | B36 | 17 | 11 | - | 4 | - | 2 | 32 | 11 | 21 | 37 |
| 3 | EB/S | 17 | 10 | - | 2 | - | 5 | 29 | 21 | 8 | 32 |
| 4 | HB | 17 | 8 | - | 3 | - | 6 | 35 | 23 | 12 | 27 |
| 5 | Skála | 17 | 7 | - | 2 | - | 8 | 20 | 25 | -5 | 23 |
| 6 | GÍ | 17 | 6 | - | 5 | - | 6 | 25 | 34 | -9 | 23 |
| 7 | B71 | 17 | 6 | - | 3 | - | 8 | 28 | 31 | -3 | 21 |
| 8 | KÍ | 17 | 5 | - | 3 | - | 9 | 25 | 26 | -1 | 18 |
| 9 | AB | 17 | 2 | - | 4 | - | 11 | 19 | 35 | -16 | 10 |
| 10 | VB/S | 17 | 2 | - | 4 | - | 11 | 15 | 38 | -23 | 10 |

**1. deild menn**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B68 | 18 | 17 | - | 1 | - | 0 | 62 | 13 | 49 | 52 |
| 2 | FSV04 | 18 | 12 | - | 3 | - | 3 | 33 | 22 | 11 | 39 |
| 3 | ÍF | 18 | 11 | - | 4 | - | 3 | 44 | 15 | 29 | 37 |
| 4 | LÍF | 17 | 9 | - | 1 | - | 7 | 40 | 26 | 14 | 28 |
| 5 | NSÍ | 18 | 7 | - | 1 | - | 10 | 34 | 42 | -8 | 22 |
| 6 | TB | 17 | 6 | - | 3 | - | 8 | 23 | 22 | 1 | 21 |
| 7 | HB | 17 | 5 | - | 2 | - | 10 | 24 | 39 | -15 | 17 |
| 8 | SÍ | 17 | 4 | - | 3 | - | 10 | 21 | 34 | -13 | 15 |
| 9 | KÍ | 17 | 3 | - | 2 | - | 12 | 18 | 44 | -26 | 11 |
| 10 | B36 | 17 | 2 | - | 2 | - | 13 | 16 | 58 | -42 | 8 |

# B36 skal royna nýggjan miðvøll



*Dystirnir millum Skála og B36 hava mangan verið javnir, og tí kunnu fólk vænta ein spennandi dyst á Skála sunnudagin.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Á Skála er alt fólkið tókt ímóti B36, sum roknar við mótstøðu av sama slagi, sum teir kendu móti B71 mikukvøldið**

SKÁLA-B36
*Jákup Mørk*

Ivaleyst mest umrøddi fótbóltsdysturin í hesum kappingarárinum man vera tann, tá ið B36 og Skála 13. mai í 9. umfari spældu 1-1 í Gundadali. Eftir nógv skriviborðsarbeiði stendur úrslitið við, eftir at B36 eitt skifti hevði øll trý stigini á sínari konto og Skála einki hevði. Nú hittast somu feløg á Skála.

Mikukvøldið fekk B36 fult móti B71, og tað er einki sum eitur hjá B36 venjaranum Kurt Mørkøre.

- Tað er neyðugt við fullari úrtøku, um vit skulu fylgja við í FM kappingini, har NSÍ er sera støðugt. Sandoyingar vóru óførir og sera snildir í kontra spælinum. Eg rokni við, at talan verður um sama slag av mótstøðu á Skála.

B36 má tó manna miðvøllin av nýggjum á Skála, tí bæði Mikkjal Thomassen og Heini í Skorini hava leikbann, meðan Ingi Højsted enn einaferð hevur verið so óheppin at bróta seg sundur.

- Miðvøllurin hevur riggað stak væl seinastu ferðirnar, og sjálvandi er saknur í hesum spælarunum. Men hetta eigur ikki at vera nakar trupulleiki. Vit hava nógv og gott fólk og harvið møguleikar at rokera á liðnum, uttan at tað viknar, staðfestir B36 venjarin.

Á Skála eru teir betri fyri hesa ferð, enn teir vóru í Klaksvík, tá ið serligur saknur var í skapandi evnunum hjá Alexandur Johansen.

- Vit eru fullmannaðir hesa ferð, og tað hevur alstóran týdning. Móti B36 plaga vit at standa okkum væl. Avbjóðingin móti teimum er stór, men vit plaga at standa okkum væl ímóti teimum, og vit spæla fyri okkara møguleika, staðfestir Skála liðformaðurin Pauli G. Hansen.

# Einki reyp í Runavík

**Í NSÍ verður mint á, at AB eitt nú móti havnarliðunum hevur megnað at vunnið stig, og at AB í Runavík var um reppið at vinna stig**

AB-NSÍ
*Jákup Mørk*

Toppliðið NSÍ fer sunnudagin at vitja botnliðið AB. Eingin ivi er um, hvør er favorittur, men í Runavík undirstrika teir, at talan er um avbjóðing, sum á ongan hátt skal undirmetast:

- Teir hava megnað at fingið stig ímóti bæði HB og B36 á heimavølli. Tað sigur ikki so lítið, vísir veteranmálverjin Jens Martin Knudsen á.

Men metir tú ikki tykkum at vera greiðar favorittar?

- Um vit ætla okkum at vinna FM, so mugu vit royna eftir trimum stigum á Argjum. Men eg vil undirstrika, at tað als ikki er talan um avgreiðsluspurning, undirstrikar Jens Martin Knudsen.

Men AB stóð seg ikki væl ímóti HB?

- HB spældi framúr væl. AB hevur nógvar góðar spælarar. Takið er at fáa teir at rigga sum lið. Undir dystinum móti HB vórðu broytingar gjørdar, og tað hjálpti beinanvegin. Tí ivist eg ikki í, at AB verður betri fyri móti okkum, enn argjamenn vóru mikukvøldið.

Á Argjum verður ásannað, at støðan ikki er serliga hugalig, nú tað eftir vikuskiftið bara verður ein tríðingur eftir av fyrsta kappingarárinum hjá AB í bestu deildini.

- Enn er møguleiki fyri, at vit kunnu bjarga okkum, og vit fara at leggja tað í, sum tað stendur til okkara at gera, er viðmerkingin uttan fyri ánna.

# Ingi aftur brotið bein

Eingin endi tykist vera á, hvussu óheppin B36 miðvallarin Ingi Højsted kann vera. Fyri stuttum var hann førur fyri at spæla aftur, eftir at hann síðani eina ferð í fjør breyt beinið. Nú er Ingi aftur settur uttanfyri.

Tá ið B36 mikukvøldið hevði vitjan av B71, fór Ingi tíðliga av vøllinum, tí hann var skaddur. Í nærdysti brotnaði kjálkabeinið. Mánadagin verður avgjørt, um Ingi skal skurðviðgerast ella ikki.

*jm*

## Við - ikki við

**AB:**
**Skaddur:** Fróði Clementsen (knæskaði)

**B36:**
**Leikbann:** Heini í Skorini, Mikkjal Thomassen
**Skaddur:** Ingi Højsted (brotið kjálkabeinið)

**B71:**
**Skaddir:** Hanus Clementsen (knæskaði), Jóhannus Jensen (ryggskaði)

**EB/Streymur:**
Allir mans tøkir

**GÍ:**
**Skaddir:** Hans Jørgen Djurhuus (knæskaði), Pól Jóhannes Justinussen (lærkriki)
**Ivasamir:** Sámal Joensen (vøddaskaði), Hendrik Rubeksen (akslaskaði),
**Við aftur:** Símun Louis Jacobsen (leikbann)

**HB:**
**Skaddur:** Jákup á Borg (vøddaskaði)

**KÍ:**
**Leikbann:** Høgni Madsen
**Ivasamur:** Paul Clapson (koykt fótin)
**Við aftur:** John Hammer (eftir U-19 landsliðsferð)

**NSÍ:**
**Skaddur:** Jann Martin Mortensen (lærkrikin)
**Ivasamur:** Andy Olsen (fótskaði)
**Við aftur:** Øssur Dalbúð (eftir U-19 landsliðsferð)

**Skála:**
**Við aftur:** Pætur Dam Jacobsen (leikbann), Alexandur Johansen (vøddaskaði), Poul N. Poulsen (lærkrikin)

**VB/Sumba:**
**Skaddur:** Birni Kærbech (fótliður)
**Ivasamur:** Suni úr Hørg (knæskaði), Aco Pandurovic (fótliður)
**Við aftur:** Dmitry Jankovic (leikbann)

# í Streymnesi

| 06 | 05 | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| - | 4-0 | - | 0-0 | 1-1 | 2-1 | 0-4 | - | - | - | - | 2-3-1 | 8-7 |
| - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | - | 0-0-0 | 0-0 |
| - | 1-2 | 1-2 | 1-2 | 0-1 | 1-3 | 5-1 | 0-0 | 2-1 | 2-2 | 4-2 | 3-2-6 | 18-20 |
| 0-1 | 2-2 | 1-1 | 2-0 | 0-1 | 1-1 | - | - | - | - | - | 2-3-2 | 7-6 |
| - | - | - | - | - | - | 1-3 | 1-2 | 1-3 | - | 0-2 | 0-0-4 | 3-10 |